## DAGSINS MEINING

# Almennar sparingar

Nú er fráboðað ein 10% sparing í almennu miðfyrisitinginí, og kann hetta ikki koma h óvart á tey, ið hava fylgt orðaskiftinum seinastu árini. Tað er sjálvandi hart, tá uppsagnir liggja í luftini, men tað skerst ikki burt, at miðfyristingin er vaksin ov nógv. Tað var bara ein spurningur um tíð, nær táttað fór at verða í, nú allir flokkar hava tosað um at minka um almennu umsitingina.

Tað kann heldur ikki koma heilt óvart á tey, ið starvast í miðfyrisitingini, at sparingar koma, tí hetta gav seg m.a. sjálvt, tá blokkurin var skorin við einari millión um dagin í eini tíð við methøgum skattainntøkum. Bert spell at undanfarna samgonga ikki hevði rygg til at taka tær beinleiðis avleiðingarnar av alt ov ógvusliga blokkniðurskurðinum og lat ópopuleru tøkini liggja til onnur at taka. Hetta var eisini greiði boðskapurin frá Búskaparráðnum tá: skuldi blokkurin skerjast, skuldu almennu útreiðslurnar eisini lækkast.

Tað er gott, at man ikki ger sum vant og letur Ráðini sjálvi avgerða hvørji øki undir teimum skulu spara, tí søgan hevur víst, at tað nærum altíð eru stovnarnir næst borgarunum, ið tá verða raktir. Tað er helst í lagi at skera miðfyristingina við 10% um ein kamb, men ávarast má ímóti at gera tað sama við landsstovnarnar. Heldur enn at skera um ein kamb í stovnunum næst borgarunum, so eigur landsstýrið at gera tær raðfestingar, ið skulu til, tí annars stendur man í tí støðu, at einki riggar optimalt, tí at alt manglar pengar. Tá er betur at gera eina beinharða politiska raðfesting, har okkurt projekt verður steðgað ella onkur tænasta verður niðurløgd, meðan alt annað riggar, sum tað skal við teimum pengum, ið tað skal hava.

Fara vit aftur til miðfyristingina, er talan helst um dugnalig og vælútbúgvin fólk, ið burdu kunnað økt um virðini úti í samfelagnum, og tí eiga vit uppá longri sikt ikki at frykta ov nógv fyri avleiðingunum av uppsøgnunum, hóast hetta uppá stutt sikt ikki er nakar stuttleiki fyri nakran part.

Stóra avbjóðingin fyri Landstýrið er nú at skipa miðfyrisitingina soleiðis, at man upprættar felags funktiónir og herðir um raðfestingina av uppgávum, soleiðis at arbeiðsbyrðarnar ikki gerast ov stórar hjá teimum fólkum, ið frameftir koma at arbeiða í miðfyrisitingini. Hetta má gerast við at minka um talið av niðursettum arbeiðs-bólkum til frama fyri skjótari avgerðum tiknar av dugnaligum einstaklingum, ið eiga at vera løntir fyri tað sama, tá um relativt smá mál ræður. Eisini mugu mannagongdir endurskoðast, tí at ein umsiting, ið arbeiður eftir donskum administrativum mannagongdum, hava vit ikki ráð til. Vit hava heldur ikki ráð til eina almenna skipan, ið uppfinnur egnar skipanir fyri alt líka frá bókhaldsskipanum til fakturering, tá líka góðar ella betri skipanir finnast sum hyllavøra úti í samfelagnum. Hetta kostar óneyðugar pengar og óneyðuga tíð.

Nógv er at tríva í, og ikki verður tað lætt hjá samgonguni. Vanahugsan, har sparingar mugu ganga út yvir góðskuna av tænastuni fyri skattaborgaran, er ikki pláss fyri. Vit mugu lyfta í felag, tí útlitini fyri føroyska búskapin eru ikki góð í løtuni. Verður ikki skalkað nú viðvíkjandi almennum rakstrarútreiðslum til frama fyri almennar íløgupengar fyri at tryggja ein minimumsaktivitet í samfelagnum, so kann tað koma aftur um brekku seinni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bíligari lesilampur, dýrari bøkur

**Oddfríður Marni Rasmussen**
*rithøvundur*



Herfyri skrivaði Kim Simonsen grein um nøgdina av bókum, og um yvirhøvur nakar kvalitetur er í rúgvuni av bókum, sum verða givnar út á hvørjum ári í Føroyum. Hetta endaði, sum alt annað kjak, við, at persónar fóru at skjóta við skørpum eftir hvørjum øðrum, í staðin fyri at viðgera kjarnuna í evninum, og hon er um vit heldur áttu at satsa uppá at givið fáar betri bøkur út, heldur enn nógvar hálvvánaligar bøkur.

Týsdagin 7.september bórust tíðindini um, at Fíggjarmálaráðið enn einaferð hevur fingið eitt herindi av neringsorg. Hesaferð hava teir ligið vaknir, tí at bókamarknaðinum ikki hevur goldið MVG til landskassan. Teir hava sett ein arbeiðsbólk at endurskáa MVG-lógina, tí sum sagt verður: *Hetta er ein beinleiðis stuðul til bókasøluna umvegis meirvirðisgjaldslógina, sum ikki er ætlað at vera ein stuðulslóg.*

Tað kann væl vera. Men helst er tað tí, at punktavgjøldini skulu avtakast á summum vørum, og tí vilja teir gjarna hava pengar inn onkran annan veg. Bíligari lesilampur, dýrari bøkur, ella okkurt sovorðið, sum heldur ikki hongur saman.

Gamalt var at siga, at vinstra hond ikki veit, hvat høgra ger, men tá høgra ikki veit, hvat høgra ger, er tíðin komin til at endurskáa seg sjálvan. Hesir somu menn, sum nú hava í hyggju at senda bókamarknaðin eini fimmti ár aftur eftir hali, eru teir somu, sum ætla at stuðla alivinnuni og rakivinnuni úr sínari neringsorg.

Eg haldi ikki, at tey úti í Royal Albert Hall hava hugsað seg um, tá ið tey ætla at seta 25% í meirvirðisgjaldi á bøkurnar. Hjá teimum sýnist hetta bert sum eitt tal av mongum tølum, ella talið hesa vikuna, um eg kann loyva mær at siga so, men myndin er ikki so einkult.

Tað hevur stóran týdning, at vit geva fólkinum bøkur at lesa. Tað hevur alstóran týdning, at vit geva ungdóminum bøkur at lesa og menna teirra áhuga fyri tí heimi, sum verður lýstur í bókunum. Bøkur eru soleiðis háttaðar, at lesarin sjálvur verður noyddur at gera sær eina mynd av tí sum fer fram, er noyddur at hugsa og taka eina støðu. Bøkur eiga ikki at vera undirhald av lættisoppaættini úr USA, har tú bara skal lena teg afturá og svølgja alt rátt. Bøkur eiga at seta spurningar, eiga at menna tankagongdina hjá lesaranum, eiga at birta upp undir kjak um bæði hetta og hatta.

Allastaðnis í bókavinnuni er peningatrot. Rithøvundum mangla pening. Forløgini mangla pening (bæði almenn og privat). Prentarar eru heldur ikki ríkir. Bøkasølurnar gerast ikki ríkar av at selja føroyskar bøkur. Øll hava brúk fyri peningi fyri at fáa hjólini at mala rætta vegin, óansæð um bøkurnar eru stuðlaðar ella MVG-fríar. Kallið barnið sum tit vilja. Tað føroyska málið er ikki eitt heimsmál og verður tað ongantíð, so um bókamarknaðurin her heima skal yvirliva alt sum kemur úr útlondum, er neyðugt at hugsa um hvussu vit kunnu menna føroyskt mál gjøgnum millum annað bøkur á føroyskum.

Aftur til fíggjarvánirnar fyri føroyska bókaheimin. Siga vit, at hesin ólukku arbeiðsbólkur í Fíggjarmálaráðnum fær sítt ígjøgnum og bøkurnar gerast 25% dýrari, hvussu so við skúlunum? Onkur má játta meira pening til at keypa skúlabøkur fyri. Politiska skipanin í Føroyum, er tann, sum prentar mest, hvussu verður har? Meiningin er helst eisini, at bløðini skulu sleppa undan at gjalda MVG, so at politikarar ikki missa sína egnu rødd, ella hvat? Og hvussu er við atgongumerkjum til fótbóltsdystir v.m? Hvussu við Bibliuni? Hetta sum er ikki eitt herindi av øvundskjúku. Øll eiga at vera líka fyri lógini. *Ikki Sannheit?*

Um so er, at meirvirðisgjaldið ikki skal virka sum ein stuðul, og tí má setast á bøkurnar, jamen, so noyðast bøkurnar at fáa stuðulin aðrastaðnis frá. Teir møguleikarnir eru fáir. Mentunnargrunnur Landsins er ein. Fjølrit er ein annar møguleiki, og so er tað sagt. Hækkingin til Mentunnargrunn Landsins varð ikki játtað, helst tí at onkur moli ella vegastubbi skuldi leingjast. Hugsaðu teir seg um eitt sindur, var ein møguleiki at hækka grunnin við tí skattinum, sum listafólkini gjalda av starvslønunum tey fáa at arbeiða fyri. Í lógini um upphavsrættin er nógv, sum kann geva lístafólkum pengar. Heldur ikki her vita politikararnir hvat, skal gerast — um lógin skal yvirtakast ella hon framvegis skal vera á donskum hondum. Tað verður sjónligari, at ongin dugir at hugsa um meir enn eitt tal í senn. Tá ið vit, sum fáast við at skriva bøkur halda fyrilestrar um føroyskan skaldskap, kunnu vit við stoltleika siga dønum, (serliga) at vit ikki gjalda MVG av bókum, og so keypa teir bøkur í Føroyum.

Tað er tó hugaligt at hoyra Jógvan á Lakjuni, maðurin, sum eigur at úttala seg rætt hesum viðvíkjandi, siga, at bókaheimurin verur fyri stórum bakkasti um meirvirðisgjald verður lagt á bøkurnar. Kanska ein glotti er.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

Aftaná TV2 málið:

# Hevði ikki hent í Føroyum

**Óli Jacobsen**

**Tíðindaflutningurin í Føroyum verið munandi meira villleiðandi enn hjá TV2, men her verður einki rættað.**

Søgan um TV2 tíðindini um skattaskipanina hjá føroyskum fiskimonnum er tann best hugsandi lýsingin av muninum millum føroyska og danska pressu.

TV2 bar skeiv tíðindini um hetta mál. Í fyrsta umfari noktaðu teir at hava gjørt nakað skeivt. Men tá teir høvdu fingið málið útgreinað í eini klagu og síðan vórðu kærdir fyri danska Pressenævnet, fekk pípan eitt annað ljóð, og søgan varð afturtikin. Soleiðis virkar ein skipað tíðindatænasta í einum skipaðum samfelag.

Eftir er at viðgera leiklutin hjá føroysku pressuni í sama máli. Sigast kann, at hann er fult út í samsvar við royndirnar av støðinum í føroyskum tíðindaflutningi annars.

Málið byrjaði við útsagnir frá donskum politikarum um, at nú skuldi nakað gerast við blokkin, tí hann sambært Hermann Oskarsyni var skaðiligur. Hetta skapti, ikki óvæntað, eina øsing millum ávísar politikarar í Føroyum, tí teir mettu hetta sum eina uppílegging í innanhýsis føroysk viðurskifti.

Tað næsta vóru so tíðindini um fiskimannafrádráttin, sum fekk formannin í fíggjarnevndini hjá fólkatinginum at hótta føroyskar myndugleikar at nýta hendan sum grundgeving fyri at skerja blokkin. Hetta fekk Føroya Fiskimannafelag at klaga Hermann Oskarsson fyri løgmanni, tá hann opinlýst var upprunin til hendan tíðindaflutningin.

**Toppurin á kransakøkuni uppá gos.**
Og nú kom alt uppá gos í Føroyum. Hermann Oskarsson slapp í øllum fjølmiðlum við gráturødd at gremja seg um hesar politikarar, sum úttalaðu seg um ein fyrilestur, sum teir als ikki høvdu hoyrt. Í hesum fyrilestri vóru fiskimenn ikki nevndir, og ikki eitt orð varð sagt um ein skaðiligan blokk!!

Samstundis fór toppurin á akademisku kransakøkuni upp at leika í um forfylging, skerjing av talufrælsi, dráp av sangfugli og annað líknandi í sama duri.

Sum liður í hesum sjónleiki helt Hermann Oskarsson so sama fyrilestur fyri løgmanni og fjølmiðlunum, sum hann skuldi hava havt á umrøddu ráðstevnu, og sambært fjølmiðlunum prógvaði alt hetta, at tey, sum høvdu "øst seg upp", høvdu misskilt alt.

**Veruleikin er ein heilt annar.**
Veruleikin er nevniliga tann, at saman við framløguni á ráðstevnuni, hevur Hermann Oskarsson havt samrøður við minst tríggjar danskar fjølmiðlar, Danmarks Radio, Berlingske Tidende og TV2.

Tann **einasta** misskiljingin í Føroyum hevur verið, at tað ikki hevur verið greitt, hvat ið varð sagt á ráðstevnuni, og hvat ið var sagt í donskum fjølmiðlum. Tað kann staðfestast eftirfylgjandi, at tað, sum Hermann Oskarsson, eftir egnu frágreiðing, **ikki** hevur sagt á ráðstevnuni, tað **hevur** hann í hvussu er sagt í donsku fjølmiðlum, soleiðis sum tað eisini er dokumenterað í FF-blaðnum.

Og tað, sum danskir og føroyskir politikarar hava svarað til, er júst tað, sum Hermann Oskarsson hevur sagt í fjølmiðlunum, í fyrsta umfari DR. Tískil er ikki gjørdur honum nakar sum helst órættur, og eingin hevur misskilt nakað.

Frágreiðingarnar frá Hermann Oskarsson í fjølmiðlum og umrøddu framførslu í Tinganesi eru snildisliga avmarkaðar til tað, sum hann hevur sagt á sjálvari ráðstevnuni. Hann førir seg fram, sum um hann als ikki hevur havt samband við danskar fjølmiðlar.

**Ger ikki mun um gerningsstaðurin er Christiansborg ella Gyngemosen.**
Men fyri úrslitið kann tað ongan mun gera, um sjónarmiðini eru komin fram á Christansborg ella í donskum fjølmiðlum, har boðskapurin jú kemur út til eina nógv størri fjøld av fólki, og tað minkar so ikki um skaðan, um tíðindini eru skeiv.

Tað avgerandi er sostatt, at formaðurin í búskaparráðnum er beinleiðis orsøkin til umrøddu hóttan frá Dansk Folkeparti, og hann er eisini upprunin til TV2 søguna, har tað nú er staðfestast, at hon er uttan nakað sum helst grundarlag.

**Avdúkandi tøgn í fjølmiðlunum.**
Tað er sjálvsagt sera avdúkandi fyri Hermann Oskarsson, at hann heilt tilvitað tegir um sína samrøðu við danska útvarpið og annars danskar miðlar, sum jú er grundarlagið fyri tað, sum er gingið fyri seg.

Men tað, sum er enn meira avdúkandi fyri teir eftir egnum tykkum professionellu fjølmiðlarnar, er, at teir eru við í hesum spæli hjá Hermann, hvørs einasta endamál er at dylja, hvat veruliga hevur gingið fyri seg.

Hetta gera teir við eins og Hermann Oskarsson bert at greiða frá tí, sum er hent á sjálvari ráðstevnuni. Føroyingar í Danmark hava í føroyskum bløðum endurgivið samrøðu við Hermann Oskarsson í danska útvarpinum, sum lættliga kundi skiljast, sum at "blokkurin er skaðiligur". Kortini hevur eingin fjølmiðil kannað hetta, enn minni endurgivið tað, og uppaftur minni konfronterað Hermann Oskarsson við tað, sum hann próvfast hevur sagt, og sum er í stríð við tað hann **sigur** seg hava sagt.

Fjølmiðlarnir hava tískil móti betri vitan tagt burtur upplýsingar av týdningi fyri lýsingina av hesum máli.

**Eingin** av teimum hevur víst á tær heilt uppløgdu mótsagnirnar hjá Hermann Oskarsson, har hann, grundað á fyriliggjandi upplýsingar, hevur sagt ósatt um sítt samband við danskar fjølmiðlar. Hann er eisini heilt ókritiskt endurgivin fyri sínar sera ósannlíku pástandir um, at Berlingske Tidende skal hava lagt honum orð í munnin, og at blaðleiðslan skal hava viðurkent hetta fyri honum. Við tí kunnleika vit hava til tíðindafólk, er hetta ein virðisleys upplýsing, um hon ikki kemur frá fjølmiðlunum sjálvum.

**Eingin** av teimum stóru fjølmiðlunum hevur rætt ein fingur fyri at kanna eftir, um undarførslurnar hjá Hermann Oskarsson eru "fup" ella "fakta", hóast her átti verið øll møgulig orsøk til tess, og hóast hetta kundi verið gjørt uttan stórvegis ómak. Og hóast hetta skuldi verið teirra skylda.

Hetta merkir, at Hermann Oskarsson og hansara garda eru endurgivin fullkomiliga ókritiskt sambært alment kunngjørda prinsippinum hjá útvarps- og nú eisini sjónvarpsstjóranum, bakkað upp av Løgtingsins Umboðsmanni, um at sannleiksvirði í politiskum tíðindum verður ikki eftirkannað.

Endamálið við tíðindaflutninginum hevur greitt verið at renna ørindi fyri Hermann. Hann er sloppin ókritiskt at vísa øllum atfinningum frá sær við grundgevingum, sum heilt greitt ikki er í samsvar við sannleikan. Og so avgjørt ikki tann fulla sannleikan. At fáa hann fram skuldi verið ein sjálvfylgja hjá óheftari pressu.



At Hermann Oskarsson er upprunin til umrødda tíðindaflutning, er eitt mál fyri politisku skipanina at taka støðu til. Hon má seta ella lata vera við at seta mark fyri, hvat ein formaður í búskaparráðnum kann loyva sær. Sigast kann við fullari vissu, at ein danskur formaður í einum búskaparráðið hevði ikki sloppið væl frá eini slíkari framferð. Tað hevði í hvussu er ein vakin donsk pressa og andstøða syrgt fyri.

**Føroysk pressa til fals.**
Men við eini pressu, sum heilt upplagt er til fals, ber hetta til í Føroyum. Hetta verður eisini gjørt við tí eyðkenda taktikkinum at tiga málið í hel. Hetta skal nokk eisini eydnast og Hermann Oskarsson veit, at nú er tað **hann**, sum setur dagsskránna. Hann veit, at fjølmiðlar, sum einaferð hava latið seg tølað, kunnu ikki koma aftur um aftur. Gera teir tað er hetta ein viðurkenning av at hava mistikið seg. Og tað fara teir fyri alt í verðini ikki at gera.

**Høvdu ikki verið afturtikin í Føroyum.**
Fyri at koma aftur til TV2, so kann sigast við vissu, at í Føroyum høvdu slík tíðindini ikki verið tikin aftur. Besta prógvið er tann tíðindaflutningurin sum júst er greitt frá. Hann er minst líka óheiðurligur sum tann hjá TV2 í hesum máli. Men meðan tey á TV2 kanska ikki hava vitað betri, so hava føroysku fjølmiðlarnir við opnum eygum villeitt føroyingar í sama máli.

Tann sum í Føroyum hevði klagað um slíkan tíðindaflutning hevði verið møttur við vanliga føroyska taktikkinum ikki at svara aftur. Tað fer eisini at henda við hesi grein. Og skuldi ein klagari verið treiskur, skuldi onkur ábending fallið um, at hann vist nokk man vera klikkaður.

**Latið Pressenævnet eisini fevna um Føroyar.**
Vit hava heldur ongan stovn ella kæruráð at klaga til. Tosað hevur verið um eitt pressuráð, men við teimum royndum, sum eru av løgtingins umboðsmanni, ikki minst á hesum økinum, er grund til at óttast fyri, at ein eitt slíkt ráð verður verri enn einki.

Spurningurin er, um tað ikki hevði verið nógv betur eisini at latið danska Pressenævnet fevnt um okkara fjølmiðlar.

Pressenævnet hevur longu skapt sær stóra virðing. Bert tað, at tað finst eitt slíkt ráð gjørdi útslagið í TV2 málinum, og eingin kann ivast í, at teir eisini høvdu verið ópartiskir í føroyskum málum.

Hetta er einasta leið burtur úr tí díki, sum føroyska tíðindatænastan er í, har eingin kann vita, nær teir hava verulig tíðindi, og nær teir renna ørindi fyri reellar og formellar makthavarar.

# Legg ikki skatt á lesing

**Ætlanir landstýrisins um at leggja MVG á bøkur fellur ikki í góða jørð hjá Bókhandlarafelagnum**

**BÓKHANDLARAFELAGIÐ**
*Tíðindaskriv*

Í arbeiðsskjalinum sigur arbeiðsbólkurin, sum hevur arbeitt við at endurskoða føroysku avgjaldsskipanina seg ongar góðar grundir duga at finna, sum rættvísger at MVG ikki skal gjaldast av bókum.

Men her kann ikki vera leita væl og leingi , tí tá MVG lógin á sinni var samtykt, var orðaskifti á tingi, har nógv góð sjónarmið komu fram, um hví júst bøkur ikki skulu vera MVG skyldugar.

Ein arbeiðsbólkur hevur sitið í ES, stuðlaður av Unesco, sum hevur roynt at fingið øll limalondini at lækka ella heilt at strika MVG av bókum.

Svenska stjørnin tók avleiðingarnar av hesum arbeiði, og lækkaði MVGið frá 25 niður á 6%. Úrslitið er ein vøkstur í søluni, sum liggur omanfyri tey 20 %. Somuleis eru greiðar ábendingar um, at tá prísurin á bókum hækkar, so lækkar sølan við tilsvarandi prosentum.

Hetta er tað sum stendur í skjalinum frá ES nevndini.

**Hví prentaðar bøkur ikki skuldu verið MVG skyldugar:**
Bøkur er vegurin til mentan, útbúgving og kunnleika av øllum slag. Lesnaður, sum kann vera undirhald eins væl og servitan, bæði til børn og vaksin, mennir lesiførleika og uppfatan, og fremur vøkstur.

Okkara samleiki livir víðari gjøgnum tað skrivaða orðið.

**Einki MVG á bókum: Fyrimunir fyri viðskiftafólkið.**
0% førir til lægri prísir á bókum, lægri prísir føra til fleiri bøkur verða keyptar og lesnaðurin verður øktur.

Viðskiftafólkini hava fleiri møguleikar, og meiri at velja ímillum, av tí at fleiri bókhandlar eru, og teir hava størri úrval.

**Einki MVG á bókum: Fyri búskapin.**
Styrkir búskapin, av tí at støðið á útbúgving, mentan og á lívslongum læruskipanum, fer at hækka.

Økir íløguhugin og fleiri fólk fáa arbeiði í bókaheiminum. Ein sunn vinna førir til størri skattainntøkur til landskassan.

Elvir nýhugsan og virkishug hjá útgevararum og bókasølum.

Soleiðis vilja tey stóru londini verja sína egnu mentan og sítt fjølbroytni. Á føroyskum koma 130 bøkur út um árið. Tað er ikki nógv, tá hugsa verður um, at á donskum koma fleiri enn 10.000 og á enskum í 100.000 tali. Tær vera stuðlaðar á ymsan hátt, sum støðan er í dag. Og hóast tað, er ein stórur partur av hesum útgávum, sum ikki bera seg fíggjarliga. Føroyskar bøkur vera ikki skrivaðar og útgivnar við vinningi fyri eyga.

Heðin Brú segði á sinni, at vit liva ikki her á oyggjunum av praktiskum ávum. Tað merkir í veruleikanum, at um vit ikki høvdu okkara egna mál og mentan, so vildi fólkatali her bert verið ein partur av tí tað er í dag. Og tann sum hevur ábyrdina av hesum her og nú, er eingin annar enn vit sjálvi.

Tað má ikki henda, at hetta sum fleiri ættarlið av hugsjónarfólki hevur bygt upp, verður brotið niður av tekniskum ávum.

Legg ikki skatt á lesing!x